# STØRV Á LANDSSJÚKRAHÚSINUM

## Leiðari til Køkin

Eitt áhugavert og avbjóðandi starv sum leiðari í føroya størsta køki, er tøkt til setan skjótast gjørligt.

Umframt tær týdningarmiklu fyrisitingarligu uppgávurnar, søkja vit eftir einum leiðara, sum skal halda áfram við tí menning, ið køkurin hevur verið í gongd við og sjálv/sjálvur í samstarvi við samstarvsfelagar, vera við til at mynda hesa menning.

Høvuðsuppgávan hjá køkinum er at veita tænastu til sjúklingar á sjúkrahúsinum, har tað eru bæði stutttíðar innleggingar og fastbúgvandi sjúklingar. Køkurin rekur eina starvsfólkakantinu, eina almenna café og veitir mat út úr húsinum.

Køkurin hevur tørv á einari størri nútímansgerð. Í nærmastu framtíð verður farið í gongd við at leggja hetta arbeiði til rættis. Tann nýggi leiðarin fær ein týðandi leiklut í hesum arbeiði.

**Leiðarin hevur ábyrg av**

- framleiðslu og góðskumenning
- starvsfólkaleiðslu og menning
- fyrisiting, rakstur og fíggjarætlan

**Vit vænta, at umsøkjarin**

- hevur útbúgving sum økonoma við leiðsluroyndum ella útbúgving sum Professionsbachelor í Ernæring og Sundhed við sergrein í Cateringleiðslu
- sær kostin sum ein týdningarmiklan part av sjúklinga- og starvsfólkarøktini
- hevur royndir innan starvsfólkaleiðslu, fíggjarstýring og KT
- røkir innkeyp og útvegarar
- er framskygd/ur og góðskutilvitað/ur
- kann varðveita yvirlitið í truplum umstøðum, og tá tað skal ganga skjótt fyri seg
- er samstarvsáhugað/ur, fyrikomandi, sjálvstøðug/ur og engasjerað/ur

**Vit bjóða**

- fakliga og fyrisitingarliga áhugaverdar og avbjóðandi uppgávur
- leiðslu av 20 dugnaligum og royndum starvsfeløgum
- dámligan og lættan samverutóna
- løn sambært sáttmála millum Kost- og føðslufelagið og Fíggjarmálaráðið

Køkurin er ein partur av Tænastudeplinum á Landssjúkrahúsinum og leiðarin vísir til tænastuleiðaran.

**Umsóknarfreistin** er 25. juni 2007 kl. 12.00

**Fleiri upplýsingar** um starvið fáast við at venda sær til Jan á Argjaboða, tænastuleiðari, jaa@lsh.fo ella tlf. 212337

## Anestesisjúkrarøktarfrøðingur

Søkt verður eftir anestesisjúkrarøktarfrøðingi til Anestesideildina til setan frá 1. oktober 2007 til 30. september 2008. Talan er um eitt farloyvisstarv, fulla tíð við tilkallivakt.

Arbeiðið á Anestesideildini fevnir í høvuðsheitum um, at doyva sjúklingar til skurðviðgerðir innan allar sergreinir, sum eru: Ortopædi, Gyn./Obst., Alm.kir., Urologi, Plastikkir., Oyra/Nøs og Háls, Tannviðg., o.a. Aðrar anestesiveitingar verða givnar til allar deildir á LS. Eisini eru vit við, tá bráfeingis sjúkraflutningur er, sum oftast til Ríkissjúkrahúsið í Keypmannahavn.

**Førleikakrøv**
Prógv og góðkenning sum anestesisjúkrarøktarfrøðingur.

Vit sóknast eftir einum starvsfelaga ið hevur royndir innan anestesiøkið, hevur góð samstarvsevnir, kann arbeiða sjálvstøðugt, er framtakshugað/ur og tænastusinnað/ur.

Kunnleiki til teldu á brúkarastøði er ein fyrimunur.

**Nærri fæst at vita** um starvið við at ringja 304500 til Óluvu Lómstein, deildarleiðara, lokal 5757, ollo@lsh.fo, ella til Nainu Túgvustein, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 5102, naina@lsh.fo

**Umsóknarfreitin** er 22. juni 2007 kl. 12.00

## Summarferiuavloysarar 2007 (endurlýsing)

Søkt verður eftir starvsfólki til fulltíðar- ella parttíðar feriuavloysarastørv í skiftandi vaktum í tíðarskeiðinum juli - august 2007. Møguleiki er fyri styttri vikariatum.
Vit ynskja starvsfólk við kliniskum royndum, góðum samstarvsevnum og evnum til at virka sjálvstøðugt. Vit søkja pleygarar, sjúkrahjálparar, heilsurøktarar, ljósmøður og sjúkrarøktarfrøðingar til hesi øki:

- psykiatriskar seingjadeildir
- hæmodialysu amb.( stongt sunnudag)
- apoplexi rehab./ geriatrisk deild
- barnadeild, børn 0-14 ár
- hjartadeild
- føðideild/præmaturstova og ljósmøðraskipanin
- intensiv deild, viðrakning og skaðastovu

**Nærri upplýsingar** fáast við at ringja 304500 til:

- Bergit Weihe, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, Psyk.depilin, lokal 4102, bergitw@lsh.fo
- Nainu Túgvustein, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, Skurðdepilin, lokal 5102, naina@lsh.fo
- Ása Poulsen, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, Heiliráðdepilin, lokal 6102, asap@lsh.fo
- Jytte Joensen, virkandi leiðandi ljósmóðir, Skurðdepilin, lokal 5301, lsjytjo@lsh.fo

**Umsóknarfreistin** er 18. juni 2007 kl. 12.00

## Sjúkrarøktarfrøðingar og Heilsuatstøðingur til G4

Deildin er ein kirurgisk seingjardeild við servitan innan ortopædi, maga/tarm og urologi. Vit hýsa eisini sjúklingum við almenn kirurgiskum-, gynækologiskum-, eygna-, oyrna-, nasa- og hálsasjúkum. Á deildini er pláss fyri 24 sjúklingum.

**Sjúkrarøktarfrøðingar:**
Tvey tíðaravmarkaði størv, sum sjúkrarøktarfrøðingur í skiftandi vaktum á starvsbrøki 0,8 eru leys at søkja til setan frá 15. oktober 2007 til og við 31. mai 2008.

Eitt tíðaravmarkað starv, sum sjúkrarøktarfrøðingur í skiftandi vaktum á starvsbrøki 0,7 er leyst at søkja til setan frá 15. september 2007 til og við 31. mai 2008.

**Heilsuatstøðingur:**
Eitt avloysarastarv, sum heilsuatstøðingur í skiftandi vaktum á starvsbrøki 1,0 er leyst at søkja til setan frá 15. august 2007 til og við 31.juli 2008.

**Krøv til umsøkjararnar**

- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur/heilsuatstøðingur
- fakligan áhuga og royndir innan kirurgiska sjúkrarøkt
- fleksibilitetur og góð samstarvsevni
- opin og positiv/ur
- vil søkja mennandi avbjóðingar

**Nærri fæst at vita** um størvini við at ringja 304500 til Elin Vitalis, deildarleiðara á G4, lokal 5064 ella til Nainu Túgvustein, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 5102, naina@lsh.fo

**Umsóknarfreistin** er 18. juni 2007 kl. 12.00

## Onnur størv (sí meira á www.lsh.fo)

**HVS- handverkari**
Umsóknarfreistin er 8. Juni 2007 kl. 12.00

**Sjúkraflutningstænastan**
Umsóknarfreistin er 8. juni 2007 kl. 12.00

**Sjúkrarøktarfrøðingur til Barna- og ungdómspsykiatriina**
Umsóknarfreistin er 11. Juni 2007 kl. 12.00

**Introduktiónstarv í intern med.**
Umsóknarfreistin er 15. juni 2007

**Fysioterapeutar (endurlýsing)**
Umsóknarfreistin er 28. juni 2007 kl. 12.00

**Sálarfrøðingur**
Umsóknarfreistin er 1. juli 2007

**Introduktiónstarv í almen kirurgi**
Umsóknarfreistin er 16. juli 2007

Lønar- og setanartreytir samb. sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið. Umsóknin skal vera Lønar- og starvsfólkadeildini í hendi, áðrenn freistin er úti.
Skrivlig umsókn við CV, autorisatión, prógvum, skjølum o.l. skal sendast til:

**Landssjúkrahúsið, Lønar- og starvsfólkadeildin, FO 100 Tórshavn**







## Á LANDSSJÚKRAHÚSINUM

- er sjúklingurin í miðdeplinum
- eru umleið 200 seingjarpláss
- eru umleið 20 læknafakligar sergreinir
- eru psykiskar og somatiskar seingjardeildir
- eru umleið 800 fólk í starvi í roykfríum umhvørvi
- er virðiligur samverutóni óansæð kyn, húðalit, politiska-, átrúnaðarliga- ella seksuella orientering

Landssjúkrahúsið J.C. Svabosgøta 100 Tórshavn Tel: +298 30 45 00 Fax: +298 31 42 53 lsh@lsh.fo www.lsh.fo